## Superliga um trý ár

Hóast talan gjørdist um niðurflyting við Fremad Amager í fjør, so er ítróttarliga málið hjá FC Amager framvegis superliga í 2011. Júst nú skal felagið fyrst og fremst stabiliserast í 1. deild, men komandi ár verður meddað eftir top-8, og so skal talan verða um uppflyting. Og nógv bendir á, at hetta árið verður møguleikin serliga stórur, tí í løtuni verður arbeitt við at víðka superliguna upp í 14 ella 16 lið. Og verður víðkanin veruleiki, verður fyrsta árið við eini breiðari superligu helst kappingarárið 2011/12.



## Brúka veggin eftir vild

Eins og við stóru Allianz Arena í Munchen, so skal nýggja multiarenan klæðast við hópatals ljós-diodum. Tá ber til at hava alt stadion í litunum hjá FC Amager, tá felagið hevur sínar heimadystir, meðan øll fasadan kann nýtast til boðskapir um hvat tað skal vera til aðrar tíðir. Bæði sum lýsingarpláss at selja og til siga frá, hvørji events verða hildin á leikvøllinum.

# mager





*Við 50.000 sitiplássum, sum øll hava frítt útsýni yvir leikvøllin, skal Copanhagen Multiarena standa til reiðar at hýsa mest sum øllum ítrótta, mentanar- og entertainment-tiltøkum*

*Grafikkur: Copenhagen Multiarena A/S*

**FAKTA**

**Copenhagen Multiarena A/S**

**Nevnd**
Jens Erik Jepsen, formaður
Brian Mollerup
Jan Jensen
Christian Didriksen Grahn
Petter Møller

**Stjóri**
Brian Mollerup

Í desember mánaði er seinasta freist at lata inn útbjóðingartilfarið til Keypmannahavnar Kommunu, sum stuðlar eini nýggjari arena-ætlan við 200 milliónum. Fyrsta ársfjórðing í 2009 tekur kommunan avgerð um, hvør ætlan verður stuðlað, og verður talan um hana hjá Copenhagen Multiarena A/S, skal nýtt stórstadion standa liðugt, áðrenn farið verður inn í 2012.

einum 15.000 til 18.000 áskoðarunum, men tann tørvin kann Multiarena-projektið altso eisini nøkta. Umframt at talan altso eisini kann vera um nógv størri hendingar eisini.

**Á nýggja Amager**

Amager hevur seinnu árini staðið í stórum vøkstri. Høvuðsstaðaroyggin telur í dag beint oman fyri 300.000 íbúgvar, men meira enn hetta tykist støðan hjá oynni í samlaða infrastrukturinum at gera hetta til upplagda staðið til eitt nýtt stadion ella multihøll.

- Eg veit ikki, hvar AEG ætlar at leggja sína høll, um tey vinna útboðið, men eg gangi bara út frá, at tey eisini hugsa um Amager. Í veruleikanum eru bara trý pláss í Keypmannahavn, sum eru tøk til byggjarí av hesi støddini. Eitt er við Lyngby, og har verður serstakliga trupult at fáa logistikkin at passa við allari ferðsluni, sum hetta heilt víst skapar. Og tað sama er trupulleikin við einum øki, sum eisini er móti Lyngbyleiðini, men tó nærri sjálvum sentrum.

- Tí er Amager sera upplagt bara út frá ferðsluni. Hartil hava vit í dag eina metro, sum lættir nógv um ferðsluna á Amager. Vit hava stutta fjarstøðu til Kastrup Lufthavn, og vit hava sjálvandi nýggja tokog brúgvasambandið til Svøríkis, so tað vildi verið serstakliga løgið, um tað ikki eisini er á Amager, at onnur áhugað samtøk ætla at byggja sína høll, sigur Brian Mollerup.